## Vatnið á heimasíðuna

Klaksvíkar Kommuna fer nú at leggja út kanningarúrslit síni av drekkivatninum. Á heimasíðuni hjá kommununi sigur Jóhan við Neyst, leiðari á vatndeildini, at kanningar verða gjørdar hvønn mánað. Vatn verður tá tappað og sent Heilsufrøðisligur Starvsstovuni, sum ger mikrobiologiskar og kemiskar kanningar av vatninum. Og tað eru hesi úrslitum, sum nú verða at síggja á heimasíðuni.



## Amerikumenn keypa Asia-bilar

Asiatisku bilmerkini hava nú vunnið sær 42,2% av samlaðu bilasøluni í USA. Alsamt hækkandi prísir á brennievni hava nevnliga havt við sær, at amerikumenn í nógv størri mun eru farnir at hugsa um orkunýtslu, tá nýggjur bilur skal keypast. Enn er General Motors tó tann fyritøkan, sum selur flest bilar í USA, men næstir teimum eru Toyota, sum hava yvirhálað Ford á øðrum plássi. Toyota hevði tó eina lítla afturgongd í samlaðu søluni. Størstu framgongdina høvdu Nissan og Honda, sum eru ávikavist fimta- og sætta mest selda bilmerkið í USA.

# at geva bøkur út

*Orðabøkurnar hjá Sprotanum verða alla tíðina dagførdar, tí tær eru teldutøkar.*
*- Málið er livandi, tí skal tað vera dynamikkur í orðabókagerð. Men henda orkan liggur ikki í tungum almennum stovnum og grunnum, sigur Jonhard Mikkelsen*


75 augment

**3** fráfall (t.d. *student attrition); natural attrition* natúrlig frágongd
**4** *war of* – pøsingarkriggj, útlúgvingarkriggj
**attune** [əˈtjuːn] *s*
**1** stilla (ljóðføri) (t.d. *a violin*)
**2** fáa at samljóða, fáa í samljóð
**3** – *to* laga eftir (t.d. *the educational system is not yet attuned to the needs of our time*)
**Atty.**
*(st.) attorney*
**atwain** [əˈtwein] *h*
*(skaldam, gl.)* sundur, í tvey
**atwitter** [əˈtwitə] *l*
ganga kykur, piprast [av bangilsi *el.* spenningi]
**atypical** [eiˈtipikl] *l*
óvanligur
**aubergine** [ˈaubəʒiːn] *n*
*(plfr.)* eggplanta, eggfrukt, aubergine *(Solanum melongena)*
**aubrieta** [ɔːˈbriːʃə] *n*
*(plfr.)* blápúta *(Aubrieta deltoides)*
**auburn** [ˈɔːbən] *l*
reyðbrúnur, kastanjubrúnur
**auction** [ɔːkʃn] *n*
**1** uppboð, søluting; *(sale by auction)* alment uppboð; *buy at an auction* keypa á uppboði; *sell by auction* selja á uppboði; *put up to auction* lata til uppboð; *all over the auction (avstr. S)* um alt, allastaðni; – *bridge* auksjónsbridge (slag av bridge har spælararnir kappast um at hava tær hægstu meldingarnar)
**2** *s* selja á uppboði
**auctioneer** [ɔːkʃəˈniə] *n*
uppboðshaldari
**auctioneering** *n*
hoyrnartittleiki
**audio response unit**
*(teld.)* ljóðsvari
**audio secretary, audio typist**
[skrivari ið skrivar eftir diktafon]
**audio signal**
ljóðbákn
**audiotape**
ljóðband
**audio-track**
ljóðspor
**audio-visual** [ˈɔːdiəuˈviʒuəl] *l*
– *aids* hoyrn-sjón hjálpartól í frálæru, AV-tól
**audit** [ˈɔːdit] *n*
**1** grannskoðan; grannskoðarafrágreiðing; grannskoðaður roknskapur; upplagseftirlit
**2** *s* grannskoða *audited and found correct (uml.)* vit hava grannskoðað roknskapin og funnið samsvar við bøkurnar; *(am, univ.)* [fylgja skeiði sum áhoyrari]
**audit commission**
kanningarnevnd
**audit department**
grannskoðanardeild
**audit evidence**
*(bú.)* grannskoðaraprógv
**audition** [1][ɔːˈdiʃn] *n*
**1** hoyrn
**2** ljóðroynd (framman undan upptøku), *(í útv.)* mikrofonroynd
**audition** [2]*s*
venja
**audition test**
*(lækn.)* hoyrnroynd
**auditor** [ˈɔːditə] *n*

av at røkja føroyska málið, og landið eigur avgjørt sín leiklut í hesum, halda teir. Men Mentamálaráðið skal ikki spæla forlag, leggja teir dent á.

Heldur skuldi tað verið soleiðis, heldur Jonhard Mikkelsen, at forløgini settu orðabókagerð í verk, góvu bøkurnar út og fingu vinningin, og so skuldi tað almenna stuðla við at goldið framleiðslukostnaðin.

- So var skottið greitt, landið stuðlaði mentanararbeiðinum, og kappingarhugurin at útgeva bestu bøkurnar dreiv verkið hjá teim privatu.

Men í Føroyum er tað ikki so væl umtókt at vinna pengar upp á mentan. Tað er næstan skeivt, sigur Annfinnur í Skála.

- Tað var ikki við vinningi fyri eyga, at vit fóru í gongd, sigur Jonhard Mikkelsen smílandi.

- Nei, men síðani eru vit kanska blivnir eitt sindur svangari, flennir Annfinnur í Skála.

### Byrjaði í lærarastovuni

At Jonhard Mikkelsen og Annfinnur í Skála endaðu sum orðabókarithøvundar og -útgevarar er ikki eitt úrslit av drúgvari tilrættalegging.

- Vit sótu á lærarastovuni í Hoydølum og østu okkum um næmingarnar, sum ikki dugdu at umseta til føroyskt. So sigur onkur, at vit burdu umsett Gyldendals ensku orðabók til føroyskt. Og Zakarias Wang, so bráður sum hann er, tekur telefonina og ringir til Gyldendal og spyr, um tað bar til at keypa forritið, minnist Jonhard Mikkelsen. 14 dagar seinni høvdu teir keypt forritið hjá Gyldendal.

- Vit anaðu ikki, hvat vit fóru í holt við. Men vit hildu bara, at um vit ikki gjørdu tað sjálvir, vórðu vit nokk noyddir at bíða heilt til dómadags, sigur Annfinnur í Skála.

- Forlagið hjá Zakariasi Wang, Stiðin, varð brúkt at geva bøkurnar út, greiðir Jonhard Mikkelsen frá. Teir keyptu forritið frá Gyldendal fyri egnan pening og fíggjaðu alt arbeiðið við privatum bankalánum, sigur hann.

- Onkur hevur funnist at, at vit brúktu ein danskan frymil. Men eg haldi tað bara hevur verið ein fyrimunur. Við hesum høvdu vit atgongd til eina rúgvu av viðkomandi dømum. Hetta er ofta ein trupulleiki í føroyskum orðabókum, har dømini, sum brúkt verða, eru úr 1700 talinum, staðfestir Annfinnur í Skála.

- Umstøðurnar vóru ikki léttar. Ongir listar vóru yvir ymisk fakúttrykk, og vit máttu byrja heilt frá botni. Zakarias Wang hevði ein lista við 70-80 heimildarfólkum, sum vóru serfrøðingar á ymiskum økjum, sum binding, matgerð, fiskiskapi, og øðrum.

Í dag er alt forlagsvirkið yvirtikið av felagnum Sprotanum, sum Jonhard Mikkelsen eigur. Telduskipanin handan nýggju orðbókina er ment av føroysku fyritøkuni, Zenit, og Jonhard Mikkelsen metir avgjørt, at tað eru útflutningsmøguleikar í hesari skipan. Hann greiðir frá, at hetta er ein tann mest framkomna tøknin á marknaðinum, og møguleiki er eisini at knýta alnótstøku útgávuna til eitt fartelefonnet. Sprotin er í samráðingum við Føroya Tele um samstarv á hesum økinum, men avtalan er ikki komin upp á pláss enn.

Til stóru orðabókaútgávuna, sum nú er á veg, hevur Sprotin fingið ávísan stuðul frá Mentamálaráðnum og eitt sindur frá privatum fyritøkum. Enn vóna teir tó, at fáa eitt sindur afturat.

## Politisk gummisella

Torbjørn Jacobsen var mentamálaráðharri tað árið, Annfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen fingu tvær árslønir at gera orðabøkurnar teldutøkar. Tá allar tríggjar bøkurnar í 2005 vórðu teldutøkar, helt Torbjørn Jacobsen røðu.

»Tað var hugaligt tann dagin Mentamálaráðið gjørdi sáttmála við teir báðar Annfinn og Jonhard. Annfinnur, ein føroysk útgáva av John Cleese og so føroyski Sisyfos-paralellurin Jonhard Mikkelsen, ið hevur rullað so nógvar klettar niðan eftir fjallasíðunum, onkur fór stiklandi oman brekkuna aftur, men nú stendur hann saman við í Skála uppi á tindinum, eftir dagar og nætur, brotnar vaktir og eini tímaløn, sum ongin man misunna teimum. Vit vistu, at arbeiðið varð lagt í hendinga góðar hendur, tit høvdu prógvað tað frammanundan, á filantropiskum og idealistiskum grundvølli, og tað skal sigast, at tit sviku ikki álitið.

Í ístaðin fyri at tosa og tosa um visiónir fyri politisku gummiselluna tíggju ár fram, brutu høvundarnir upp um armar og fóru til verka. At talan er um eitt tjóðskaparligt bragd av teimum stóru eri eg als ikki í iva um.«

*Sosialurin, 27. maj 2005*